# Bert tveir bátar við bryggju

**Lítið virksemi á havnalagnum í Norðdepli ein fríggjadag í apríl mánaði**

FISKAARBEIÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Norðdepil:** Tá vit snara oman móti flakavirkinum, síggja vit, at tað liggja bert tveir útróðrarbátar við bryggju í Norðdepli henda dagin.

Í tí eina er einki lív og einki menniskja at hóma, men í hinum eru nakrir menn í ferð við at taka ymiskt innanborða. Teir eru helst á veg til útróðrar.

Vit skunda okkum oman, tí líkt er til, at teir kunnu leggja frá landi hvørja løtu tað skal vera.

Stuttligt hevði verið at fingið eitt lítið prát við teir um fiskiskap og annað í hesum sambandi.

Vit koma oman á bryggjuna, men í somu løtu leggur hesin útróðrarbáturin frá landi. Og nú síggja vit, at talan als ikki er um ein bát, har menn veiða fisk, men um ein bát har menn flyta fólk - ferðafólk.

Talan er nevniliga um strandfaraskipið Súluna, ið røkir sambandið millum Sørvág og Mykines.

Av einihvørjari orsøk hevur hetta skipið ligið við bryggju í Norðdepli, men er nú á ferð vestur aftur, tí nú skal gerast klárt at taka ímóti ferðafólki til Mykinesar.

### Einki óljóð

Longur norðuri á havnalagnum liggur flakavirkið við navninum "NORÐFRA", men har er heldur ikki nógv virksemi at hóma og at hoyra henda seinasta fríggjadagin í apríl mánaði.

Tá mest hevur verið at gjørt hava tey verið eini 45 til arbeiðis, men í dag eru tey munandi færri í tali. Bert átta fólk.

Sum vit nærkast virkinum síggja vit ein trukk koyra aftur og fram, og nakrir mans standa og spula uttan og innan.

Ein teirra er 38 ára gamli Fimmbogi Poulsen úr Norðdepli, sum hevur verið á virkinum seinasta hálvaannað mánaðin.

# – Fiskaarbeiði er veruliga mítt

**- Mær dámar væl at arbeiða her á NORÐFRA, sigur Fimmbogi Poulsen**

FISKAARBEIÐI
*Snorri Brend*

**Norðdepil:** Hóast virksemið ikki var av tí mesta henda seinnapartin, vit vitjaðu á NORÐFRA, so høvdu teir kortini gjørt ymiskt fiskaarbeiði um dagin.

- Í dag hava vit glaserað fløk av reyðspettu og tungu. Og í gjár arbeiddu vit kalva og annað slíkt, sigur Fimmbogi.

Hann og hini arbeiðsfólkini eru sjálvandi altíð spent eftir at vita, hvussu tann komandi vikan man fara at síggja út.

Og hvussu - visti Fimmbogi nakað um arbeiðið ta komandi vikuna?

- Nei, eg veit einki um nakað. Sovítt eg veit, hava teir ikki keypt nakran fisk enn.

- Men her er okkurt á goymsluni sum skal gerast liðugt. Meir veit eg ikki, sigur hann.

Hesin arbeiðsdagurin fer skjótt at líða móti endanum. Fimmbogi hevur verið til arbeiðis síðani kl. 8 í morgun og nú nærkast klokkuni fýraftan.

- Vit byrja kl. 8 um morgunin og gevast kl. 4, tí vit bara hava 20 minuttir í døgurðapausu. So tað er ikki so galið, sigur hann.

### Fyrifallandi arbeiði

Ein av uppgávunum hjá Fimmboga á virkinum hevur verið at skera flakið sundur og síðani partera tað sundur í portiónir, áðrenn flakið verður raspað.

- Annars hevur tað verið alt fyrifallandi arbeiði, - og eisini havi eg greipað av og á, sigur hann.

Hann er ein av teimum nýggjaru arbeiðsfólkunum á hesum virkinum. Tá vit prátaðu við hann hevði hann bert verið her í hálvanannan mánað.

Frammanundan tí arbeiddi hann á einum øðrum flakavirki, sum eisini er í familjuni hjá teimum, ið eiga NORÐFRA.

- Eg arbeiddi somuleiðis í tríggjar mánaðir í Norðurfisk í Árnafirði, sigur Fimmbogi, sum eisini hevur siglt nógv, eitt nú sum dekkari við klaksvíksbátinum Núpi.

### Gott arbeiðspláss

Í farnu viku høvdu vit samrøðu við tvær av kvinnunum, sum arbeiddu á hesum sama virkinum. Henda dagin vóru tær báðar við í framleiðsluni av teirri vælsmakkandi fiskasuppuni.

Tær nevndu í samrøðuni at arbeiðsfólkið ikki var so stórt á virkinum, og at hetta tískil gjørdi, at samanhaldið var nógv betri millum fólkið á virkinum.

Hetta sama er Fimmbogi eisini samdur við teimum í.

- Mær dámar sera væl at arbeiða her. Her er slett ikki so galið.

- Mær hevur altíð dámað væl at arbeitt fisk. Og tja - tað er faktiskt mítt, sigur hann við einum brosi.



*Fimmbogi Poulsen dámar væl á virkinum í Norðdepli. Her tekst hann við alt fyrifallandi arbeiði, - her er hann í ferð við at rudda inni í frystigoymsluni*

*Mynd: Bárður*